# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*– Vit fara at halda fram við skjóta spælinum, og so ætla vit at hava eina sterka verju frammanfyri Marian í málinum*

*Jacob Jónsson, venjari hjá StÍF*

# StÍF skal halda fast um skjóta spælið

**Sjálvt um fleiri av stuðulsleikarunum hjá StÍF eru givnir, so ætlar nýggi venjarin at fáa eitt betri úrslit í ár, enn liðið megnaði í fjør. Málið er at enda millum trý tey ovastu. Tað skal gerast við eini ágangandi verju og einum skjótum álopi**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Flest øll hondbóltsáhugaði kennast við navnið Jacob Jónsson. Íslendingurin kom til Føroyar fyri nøkrum árum síðani, og hann hevur verið millum bestu leikararnar í føroyskum hondbólti frá tí degi hann steig fótin í eina føroyska ítróttarhøll. Á vøllinum hevur hann umboða Neistan, Kyndil og H71, men nú hevur hann valt at flyta seg av vøllinum á bonkin, har hann skal standa á odda fyri besta manslíði hjá StÍF.

## Vilja bøta um úrsliti frá í fjør

StÍF endaði á einum fjórða plássi síðsta kappingarár, og hetta ætlar Jacob Jónsson at broyta: "Vit skulu bøta um úrsliti frá í fjør av. Nú skulu vit royna at enda millum trý tey ovasta liðini, tí tað skal altíð vera málið. Sjálvt um vit hava mist nógvar mans, so meti eg liðið vera nóg gott til tess."

Hann ásannar tó, at hetta ikki gerst ein løtt uppgáva. Hann sigur, at øll liðini eru sera jøvn í ár, og at hann væntar eina harða kapping við serliga Kyndil og KÍF.

## Royndir leikarar givnir

StÍF hevur mist fleiri av størstu profilunum til hetta kappingarárið. Brøðurnir Arthur og Alexandur Johansen eru givnir, og Pauli G. Hansen fer neyvan at spæla. Jacob Jónsson heldur eisini, at hetta er ein keðilig støða fyri StÍF: "Tað er altíð keðiligt at missa so góðar leikarar, men vit mugu arbeiða víðari. Vit fáa kanska ein trupulleika við breiddini í byrjanini, tí spælararnir, vit hava mist, hava havt stóran týdning fyri liðið."

Hann sigur tó, at har eru aðrir leikarar komnir í staðin, og serliga íslendingurin Finnur Hansson verður stórur styrkur fyri liðið.

## Ágangandi og skjótur hondbóltur er vegurin

Skjótur álopshondbóltur og ágangandi verja hava altíð eyðkent besta manslið hjá strandingum. Hetta ætlar Jacob at halda fast við, tí hann heldur, at á hesum økinum eru fá lið so væl fyri sum StÍF: "Eg ætli mær ikki at gera nakrar stórar broytingar. Vit fara at halda fram við skjóta spælinum, og so ætla vit at hava eina sterka verju frammanfyri Marian í málinum."

Um hetta fer at ganga hjá strandingum, so væntar Jacob, at teir kunnu røkka heilt langt í komandi kappingarári.



*– Sjálvt um vit hava mist týðandi leikarar, so meti eg liðið vera nóg gott til at enda millum trý tey ovastu.*

ATLANTIC AIRWAYS
HONDBÓLTUR MENN

## FAKTA - StÍF menn

| | |
|---|---|
| **Stovnað:** | 1942 |
| **Formaður:** | Andras Danielsen |
| **Venjari:** | Jacob Jónsson |
| **FM-heiti:** | 5 |

# Sveinur skal lyfta arvin

**Málið er altíð at vinna, og í so máta er einki broytt. Men vit hava mist nógv fólk, og tí kann tað kanska gerast truplari hjá okkum, enn tað hevur verið okkurt annað árið**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Hetta sigur Sveinur Justinussen, sum er eitt av størstu talentunum í føroyskum hondbólti. Sveinur er 23 ára gamal, men hevur longu í nógv ár verið ein av týdningarmestu leikarunum hjá StÍF. Hann væntar, at árið í ár kann gerast trupult, tí fleiri av berandi kreftunum ikki eru við longur. Nýggir spælarar standa tó klárir, og hesir skulu nokk klára uppgávuna.

## Stórur smeitur fyri strandingar

Strandingar hava mist nógv fólk til komandi kappingarár, og hetta heldur Sveinur vera ein stóran miss fyri StÍF: "Vit hava mist Arthur, Alexandur og Paula, og hetta fer helst at síggjast aftur. Teir hava verið fastir fúsir á besta liðnum í nógv ár, so sjálvandi fara teir at mangla."

Hann væntar tó ikki, at strandingar fara at leggja árarnar inn av teirri grund: "Vit fara út fyri at vinna hvønn dyst. Vit hava fingið ein nýggjan venjara, sum hevur góðar og fjølbroyttar venjingar. Harafturat er Finnur Hansson komin úr Íslandi, og hann er stórur styrkur hjá liðnum."

## Jøvn kapping

At enda sigur Sveinur, at hann væntar eina sera javna kapping. Hann heldur, at liðini eru javnari, enn tey kanska nakrantíð hava verið, men vónar, at StÍF megnar at toga seg upp millum trý tey fremstu, tí hann vil fegin betra um úrslitið frá síðsta kappingarári: "Kappingin sær óvanliga spennandi út. Sum nú er, sær Kyndil kanska út til at hava sterkasta liði, meðan hini fimm liðini øll tykjast sera jøvn. Eg vóni, at vit náa millum trý tey fremstu liðini, men tað verður í harðari kapping við VÍF, Neistan og KÍF."

Nú eru tveir av størstu profilunum givnir, men menn standa klárir at lyfta arvin. Síðstu árini hevur Sveinur, saman við bróðurinum Leivi, spælt seg inn í bakketuna hjá StÍF. Nú skulu teir báðir taka yvir eftir brøðurnar Arthur og Alexandur.

## Brøðurnir báðir gevast

Einaferð vóru teir tríggir í tali á vøllinum. Nú er eingin. Talan er sjálvandi um brøðurnar Arthur, Tummas og Alexandur Johansen, sum allir hava leikt við besta manslíði hjá StÍF.

Vit frætta av Skála, at Arthur umsíðir hevur valt at leggja skógvarnar á hillina, eftir at hann í eini 10-15 ár hevur verið millum fremstu hondbóltsleikarar í landinum. Síðstu árini hevur hann ikki vant støðugt, og nú tykist avgerðin vera tikin.

Eisini yngsti bróðurin, Alexandur, hevur valt at steðga. "Eg havi verið nógv plágaður av skaðum, og tí er ikki lætt hjá mær at venja alt árið. Eg spæli fótbólt, og tað havi eg valt at gera framyvir. Eg vil fegin vinna okkurt við fótbóltsliðnum hjá Skála, og eftirsum eg havi roynt at vunnið bæði FM og steypakapping í hondbólti, so fari eg at geva alt í fótbóltinum nú."

Hetta er ein stórur missur fyri StÍF, men eisini fyri føroyskan hondbólt, sum nú missur tveir av størstu profilunum síðstu árini.

